Anelka vil til Monaco

Franski framherjin hjá Manchester City, Nicholas Anelka, tykist verða á veg aftur til heimlandið hjá sær. Champions League-finalistarnir úr Monaco vilja fegnir hava fyrrverandi landsliðsframherjan, og sambært enskum miðlum hevur Anelka hótt við at fara í verkfall, um Manchester City ikki loyvir honum at fara til Monaco fyri einar 140 milliónir krónur.

Real bjóðar 220 milliónir fyri Vieira

Tað ljóðar fyri vist, at Real Madrid týsdagin bjóðaði ensku meistarunum Arsenal 220 milliónir fyri liðskipara teirra Patrick Vieira. Hetta boðið er tó helst ov lágt, tí vætandi vil Arsenal hava í minsta lagi 300 milliónir fyri miðvallaran. Venjarin hjá Real Madrid, Jose Camacho, sigur, at hann vil hava Vieira innan hósdagin, tí tá er seinsta freist at melda spælarar til triðja umfar í Champions League, har Real Madrid antin skal hitta banamenninar hjá HB, FC Wit, ella polska liðið Wisla Krakow.

Bobby Fischer biðið um friðskjól í Japan

Fyrrverandi heimsmeistarin í talvi, amerikumaðurin Bobby Fischer, hevur søkt um politiskt friðskjól í Japan, meðan hann stríðist fyri at sleppa undan at verða sendur aftur til heimlandið USA.

Fischer hevur verið eftirlýstur síðani 1992, tá ið hann breyt handilsbanni móti Jugoslavia við at spæla ein uppvísingsdyst móti gamla arvafiggindа sínum, Boris Spasski, í Sveti Stefan.

Tyson skurðviðgjørdur

Fyrrverandi heimsmeistarin í tungvektsboksing, Mike Tyson, bleiv mánadagin skurðviðgjørdur í tí eina knænum, tí at hann oyðileggði sær meniskin í dystinum móti eingilskmanninum Danny Williams leygarkvøldið. Eftir eina góða byrjan upp á dystin endaði Tyson í gólvinum í fjórða umfari, eftir at hava fingið eina rúgvu av sløgum frá Williams. Læknin, sum skurðviðgjørdi Tyson, segði, at hann var ovfarin av, at Tyson megnaði at boksa trý umfør við skaðanum, og at hann megnaði at ganga úr ringinum.

Baggio umhugsar comeback

37 ára gamli italiumaðurin, Roberto Baggio, sum í fleiri ár taldist millum heimsins bestu fótbóltsspælarar, umhugsar nú at gera comeback á fótbóltsvøllinum, eftir at hava verið "pensionistur" í bara tveir mánaðar. Baggio hevur fingið tilboð frá tveimum av gomlu feløgunum hjá sær, Fiorentina og Bologna, og hann sigur tey verða sera freistandi. Ein av orsøkunum til, at Baggio legði skógvarnar á hillina, var annars, at hann var sera nógv darvaður av skaða seinnu árini.

Føroyingur við í danskari landsliðsbók

Herfyri kom ein bók út við profilum av teimum 2198 leikarunum, sum seinastu mongu árini hava umboðað tey ymisku donsku fótbóltslandsliðini. Bert ein av hesum mongu leikarum hevur umboðað tvinni lond í sínari fótbóltstíð, og tað er føroyingurin Oddmar Færø, sum hevur spælt á danska unglingalandsliðnum, og seinni leikti hann á føroyska A-landsliðnum.

Tá ið Oddmar Færø leikti á danska unglingalandsliðnum, var hann liðfelagi við so mætar leikarar sum Peter Schmeichel og Michael Laudrup. Oddmar flutti eftir hetta til Føroya, har hann gjørdi vart við seg á bestu liðunum hjá ávíkavist B68 og B36. Í Danmark leikti Oddmar Færø við Glostrup IC.

tn

Súkkling á ólavsøku 2004

Týskvøldið 27. juli skipaði Tórshavnar súkklufelag fyri súkklukappin fyri børn og vaksin.

Súkkla var á Hálsi. Málið var uttan fyri bygningin hjá Føroya Tele á Heykavegi. Teinurin var Heykavegur - Starvegur - Falkavegur - Tjaldursvegur- Heykavegur.

Kappast var í býarkoyring. Teinurin runt er uml. 600 m.

Tað vóru fleiri luttakarar við sum ikki fyrr hava verið til súkklukappingar sum TSF hevur skipa fyri, og vóna vit at síggja meir til hesar seinni.

Menn, unglingar og børn kappaðust og úrslitini vóru hesi

Gentur ´96 og yngri
Súkklaðu 2 umgangir

1 Birita Dam
2 Maria Jakobsen
3 Kristina Jakobsen
4 Hildur Poulsen

Dreingir ´96 og yngri
Súkklaðu 2 umgangir

1 Kristian Johansen
2 Tóri Nielsen
3 Martin Olsen
4 Rói Johannesen

Dreingir árg. ´93 - ´95
Súkklaðu 4 umgangir

1 Finnur Mellemgaard
2 Beinir Højgaard
3 Jóanis Albert Nielsen
4 Jens Pauli Johansen
5 Trúgvi Jakobsen

Gentur árg. ´90 - ´92
Súkklaðu 6 umgangir
1 Sára Olsen

Dreingir árg. ´90 - ´92
Súkklaðu 6 umgangir

Veteranurin Bogi Kristiansen vann súkklukappingina hjá teimum vaksnu á ólavsøku

savnsmynd

1 Rúni Bláfoss
2 Niels Christiansen
3 Kári Joensen

Unglingar árg. ´87 - ´89
35 min + 1 umg.

1 Torkil Veyhe

Vaksin árg. ´86 og eldri
35 min + 1 umg.

1 Bogi Kristiansen
2 Eli J. Christiansen
3 Esmar Joensen
4 Beinir Rasmussen
5 Christian Guttesen
6 John Joensen
7 Geyr Gilsteinson
8 Ásbjørn Nattestad

Úrslit frá ólavsøkurenningin 2004

Ólavsøkan byrjaði, sum vanligt, við at Bragdið skipaði fyri Ólavsøkurenning á Skálatrøð týskvøldið. Luttøkan var metstór og í alt komu 269 rennarar í mál. Í fjør luttóku 180 rennarar.

Sam Vang og Rigmor N. Joensen úr Bragdinum gjørdust vinnarar hjá ávikavist monnum og kvinnum. Sí úrslitini hjá nr. 1, 2 og 3 í øllum bólkunum niðanfyri.

Umstøðurnar at renna vóru sera góðar og stór mannafjøld, umleið 1000 fólk, hugdu at og stuðlaðu rennarunum sum runnu ávikavist 5 km, 1200 m, og 600 m teinar.

Allar kappingarnar í ár hava sett met í luttøkutali og ikki kann sigast annað enn, at frælsa ítróttin er í stórari menning. Fyrr í juli var ein lítil hópur til stóra altjóða ungdómskapping "Øresundspelen" í Svøríki og úrslitini hjá umboðum okkara vóru sera góð. Tað er tí at fegnast um, at Tórshavnar Kommuna í løtuni arbeiðir við ítøkiligum ætlanum til frama fyri frælsu ítróttina í Havn.

Menn 5 km

Bólkur	Navn	felag	Tíð
1	Sam Vang,	Bragdið	16:42
2	Regin Zachariassen,	Bragdið	16:47
3	Guttormur Sørensen,	Treystið	17:02

Menn Veteranar 5 km

1	Óli Olsen,	Bragdið	19:33
2	Steindór Hjaltalin,	Bragdið	19:46
3	Tummas Joensen,	Treystið	20:09

Kvinnur 5 km

1	Rigmor N. Joensen,	Bragdið	19:50
2	Jana Jacobsen,	Frælsi	22;31
3	Brynhild Absalonsen,	Bragdið	22:36

Kvinnur veteranar 5 km

1	Jóngerð Høgnesen,	Bragdið	23:08
2	Durita Rasmussen,	Frælsi	27:49
3	Anna R. Jacobsen,	Bragdið	28:36

Dreingir 17 1200 m

1	Jóan Karl Joensen,	Bragdið	3:39
2	Ólavur F. Christiansen,	Treystið	3:49
3	Robin Jønsson,	Roysnið	3:49

Gentir 17 1200 m

1	Marin í Dali, Bragdið		4:22

Gentir 13 1200 m

1	Bjørg Herup Olsen,	Bragdið	4:21
2	Vár Gregersen,	Frælsi	4:29
3	Rebekka Fuglø,	Treystið	4:37

Dreingir 13 1200 m

1	Ari Johannesen,	Bragdið	4:15
2	Gilli Rólantson		4:18
3	Eli Falkvard Nielsen,	Frælsi	4:19

Gentir 10 600 m

1	Kristin-Lív Jónsdóttir		2:14
2	Gurðið Eystberg,	Bragdið	2:14
3	Annika Højgaard Povlsen		2:22

Dreingir 10 600 m

1	Rúni Seloy,	Bragdið	2:01
2	Sølvi Egilsson,	Frælsi	2:07
3	Ragnar Khaliqhay,	Frælsi	2:07

Gentir 7 600 m

1	Margret Petersen		2:46
2	Ása Egilstoft Nielsen,	Frælsi	2:51
3	Katharina Dalsgaard-Jacobsen		2:53

Dreingir 7 600 m

1	Betuel Hansen,	Roysnið	2:22
2	Beinir Johannesen,	Treystið	2:24
3	Steingrím Hallsson,	Bragdið	2:34

Summarútsølan byrjar mikudagin 4.aug kl. 9.00

P/F hjá KISSA
TÓRSGØTA · 100 TÓRSHAVN · TEL 31 13 95

Til Sølu
PEUGEO T 307
grønur
árg. 2002
km.39.000
PRÍSUR KR. 120.000,-
Tel 27 29 88

Vinnari av málninginum eftir Gunnari Streymoy, sum drigið varð um í sambandi við listaframsýningina hjá á ólavsøku, gjørdist skrá nr. **478**. Vinnarin kann ringja tel. 211817.

Lions Club Tórshavn

Tórshavnar Ítróttarráð

Úrslit av drátti 3. august 2004

Hesir seðlar hava vunnið:

Vinningur nr. 1:	18966
Vinningur nr. 2:	17042
Vinningur nr. 3:	6104
Vinningur nr. 4:	9058
Vinningur nr. 5:	10406
Vinningur nr. 6:	13651
Vinningur nr. 7:	20941
Vinningur nr. 8:	19902

Vinnarnir vera bidnir um at seta seg í samband við Kristiannu á tlf.: 227717

SPEEDBÁTUR
BAYLINER 2052 BR **TIL SØLU**

Innbygdur motorur 4,3L
Kr. 97.000,-

Fá sleipivogn við
fyri kr. 20.000,-

273703

SUNNUDAGSDØGURÐI Á HOTEL NORÐ
Sunnudagin 28. august spælur
Pætur við Keldu
Livandi tónleik

Forrættur:
Fesk súpan við flutes

Høvuðsrættur:
Oksafilet v/bátaeplum og hvítum eplum, grønsaks sauté, grønmeti og sherrysós

Dessert:
Stór kakubuffet við kaffi, er at fáa allan sunnudagin

Kostnaður: 175,-
(børn kr. 80,-)

Ring og bílegg borð á tel 45 12 44